## Ársins Songrødd 2004

Næsta umfar av ársins songrødd, verður í Trongisvági komandi leygarkvøld. Tey luttakandi verða 7 í tali.

Tá sangumfarið er yvirstaðið, verður forkunnugt lasarashow. Tað er TB, sum hevur fingið fatur á 4 kraftigum lasarum til endamálið. Eisini verður scratchshow við okkara einasta tílíka dj.

**EyS**



## Rektarin dansar tango

Forkunnugt skeið í tangodansi er á skránni um vikuskiftið. Tað er Anne Lise Winther og Mads A. Winther, rektari á Studentakúlanum í Hoydølum, sum skipa fyri dansiskeiðnum. Tey hava fingið professionellu dansararnar Maríta Bjerring og Adrián Durso úr Argentina at halda skeið í tango. Dansiskeiðið verður í høvuðsstaðnum, og tað er fyri fólk við einum sindri av dansikunnleika.

– Eini tjúgu fólk hava meldað seg til skeiðið, og tey hava øll ein ávísan dansikunnleika. Men í heyst verður skipað skeiði í byrjunartango, sigur Anne Lise Winther, samskipari.

Tangoskeiðið um vikuskiftið endar mánadagin, og fyrireikararnir, Anne Lise og rektarin, dansa eisini við.

– Tað skulu jú tvey fólk til at dansa tango, sigur Anne Lise.

**hkm**

## Slóðbrótandi viðgerð fyri likam og sál

Týskvøldið 27 apríl verður á fyrsta sinnið fyrilestur hildin um TFT í Føroyum. TFT er stytting fyri Thought field Therapy, og viðgerðin sigst at kunna loysa bæði sálarligar og likamsligar trupulleikar. Hetta er ein skjót og pínuleys viðgerð, ið samskipar vitan úr meridianlæru, kinesiologi og kognitivari viðgerð. Viðgerðin fer fram á tann hátt, at pikkað verður spakuliga á húðina, í serligum mynstrum. Á henda hátt verða orkuleiðirnar í kroppinum stimbraðar.

Fyrilesturin, hildin av dananum Lars Mygind, verður í B36 húsinum týskvøldið kl 19 og kostnaðurin er 150 kr. Tá ber eisini til at bíleggja sær tíð til viðgerð.

**EyS**

## Biljagstran í Havnini

Týsnáttina 21. apríl, var ein biljagstran í Havnini. Ein bilur koyrdi undan politinum so at siga um allan býin, frá Jóannesar Patursonargøtu, eftir Landavegnum, eftir Velbastaðvegnum, út á Ringvegin, oman í býin og oman á Skálatrøð, har bilurin slapp undan politinum.

Politibilurin fekk nakað av skaða av hørðu koyringini. Hann rendi á ein lyktapela og ein garð í smølu Sigmundargøtu, við Skálatrøð.

Seinni um náttina ringdi tann, sum átti jagstraða bilin, og meldaði hann stolnan. Politiið sigur seg hava spor at ganga eftir í málinum, og væntar skjótt at finna mannin, ið koyrdi undan.

**EyS**

## Familjudagur á Skálatrø flaggdagin

Flaggdagin – sunnudagin – verður familjudagur á Skálatrø í Havn.

Tað er Stuðulsfelagið Knørrur, sum skipar fyri, og á skránni er m. a. køkutombola, fiskibrunnur, seymsláing, karusell, sjórænaraskip o. a.

Eisini verður kaffi, kakao og bollar o. a. til sølu. Tiltakið byrjar kl 14.

# Hornorkestur í Sjónleikarhúsinum

Eftir flaggdagshaldið í Havn sunnudagin, sum Havnar Hornorkestur sum vant skpar fyri, verður konsert í Sjónleikarhúsinum.

Konsertin verður kl 19, og fara Havnar Hornorkestur og felagsorkestrið úr Sørvági og Vestmanna at spæla.

Konsertin er í samband við, at Havnar Hornorkestur fer til eina kapping í Glasgow seinni í mánaðinum. Skráin í Sjónleikarhúsinum verður tann sama sum til kappingina.

Vestmenningar vera í ár vertir fyri árligu musikkstevnuni, sum verður Dýra Biðidag.

Konsertin í Sjónleikarhúsinum byrjar klokkan 19 og varar umleið ein tíma.

**el**



# Væleydnað violinskeið



ì døgunum 4 til 7 apríl, var aftur í ár skipað fyri verkskeiði í violinspæli. Tríggir tónleikalærarar úr Belgia vóru her og undirvístu ungum, føroyskum violinleikarum. beligiumenninir vóru komin hendavegin einans til hetta endamálið.

Undirvísingin innibar bæði einkulttímar og samanspæl, og endaði við eini framførðslu í Norðurlandahúsinum. Bæði heilt ungir og víðarikomnir violinleikarar vóru við á skeiðnum, sum eydnaðist sera væl.

Sagt verður, at tað serliga var hugaligt at síggja góða samanhaldið millum luttakararnar, hóast stóra aldursmunin.

Tað var Suzukifelag Føroya, sum skipaði fyri.

**EyS**

# Trøllapætur aftur á pall

Leygardagin 24 apríl kl 15 verður stórt barnatiltak uppi í høllini á Hálsi, har Trøllapætur og omman aftur vera at síggja á palli. Hetta verður fyrstu ferð í meiri enn eitt ár, at omman og Trøllapætur fara á pall, og tey hava fingið Angelu at hjálpa sær.

Tey lova bæði sang og tónleik, og alt møguligt annað, sum ikki er gott at vita hvat er. Men har verður í øllum førum lív í.

Tað er ungdómurin í Neistanum, sum skipar fyri tiltakinum. Tey skulu



nevniliga til Partillecup í Svøríki í summar, og hava tískil brúk fyri nógvum peningi.

**EyS**



*26 ára gamli Sigurd Mikladal varð mikukvøldið valdur til nýggjan formann í Norðoya Frítíðar og Ítróttarráð fyri Jan Gardar, sum ikki ynskti at stilla uppaftur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Formansskifti í NFÍ

**Norðoya Frítíðar og Ítróttarráð hevði aðalfund mikukvøldið á Klaksvíkar Sjómansheimi. Sitandi formaðurin Jan Gardar ynskti ikki at stilla uppaftur, og fundurin samtykti einmælt, at Sigurd Mikladal verður nýggjur formaður**

AÐALFUNDUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Góður helmingurin av teimum 28 feløgunum í NFÍ møttu til aðalfundin, sum varð hildin á Sjómansheiminum mikukvøldið.

Fyri afturvali stóðu Jan Gardar og Símun Michael Sørensen. Jan stillaði ikki uppafur, men Símun Michael varð afturvaldur sum kassameistari.

Nevndin í NFÍ er mannað av trimum persónum og sær í dag soleiðis út:

Sigurd Mikladal er formaður, Símun Michael Sørensen, kassameistari og Nikolas Olsen, skrivari.

Jan Gardar sigur, at orsøkin til, at hann valdi ikki at stilla uppaftur, er, at hann vil hava betur stundir til sína familju. Unnustan hjá Jan skal eiga stutt áðrenn norðoyastevnu.

– Serliga hendan tíðin frá nú av og til norðoyastevnu er strævin, so eg haldi ikki, at tað er so skilagott, at eg haldi fram, sigur Jan Gardar, og hann leggur eisini afturat, at hann hevur altíð nógv at gera upp til norðoyastevnu, so hann fer ikki at keða seg fyri tað, um hann ikki fer at arbeiða við fyrireikingunum til sjálva stevnuna.

Hann ásannar tó, at tað verður løgið ikki at vera við til fyrireikingarnar av norðoyastevnuni í ár. Jan hevur sitið í nevndini í NFÍ í átta ár, harav tey fýra sum formaður.

### Nýtt ættarlið

Nýggi formaðurin í NFÍ er sum sagt Sigurd Mikladal. Hann er sonur Ísak Mikladal, sum var við til at stovna NFÍ seinnapartin av áttatiárunum, so her kann sigast at vera talan um eitt nýtt ættarlið, sum tekur við. Sigurd er 26 ára gamal og arbeiðir á Com – Data. Hann var vegna forfall ikki sjálvur tilstaðar á aðalfundinum, men hann hevur tikið við valinum.

Fyri framman liggja nú fyrireikingarnar av norðoyastevnuni, sum verður vikuskiftið 5. og 6. juni.

Á sjálvum aðalfundinum varð ikki so nógv tosað um stevnuna. Ein fyrireikandi fundur hevur verið, og tað fara at verða fleiri komandi tíðina.

# Bindiklubbahugni á hotel Norð

**Leygarkvøldið 8. mai skipar hotel Norð á Viðareiði fyri serligum hugnakvøldi. Hetta hugnakvøldið er ætlað bindiklubbum kring alt landið. Tey tiltøk eru á hotellinum hendan dagin. Ein marknaður um dagin og borðhald um kvøldið**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Leygardagin 8. mai verður bindiklubbahugni á hotel Norð. Talan er um eitt afturvendandi tiltak, sum hotellið fyri triðju ferð skipar fyri. Undirtøkan fyri hesum hevur verið góð, og bindiklubbar koma allastaðnis frá til hetta hugnakvøldið.

Men tað verður ikki bara hugnakvøld við mati og undirhaldi. Tiltakið byrjar longu klokkan 16, har ymsir handlar fara at sýna fram. Handlarnir eru La Femme, Trillan, Ka-Ki, Guðrun Elltør við tógvi úr Hetlandsull og egnum uppskriftum, Gull Britt Hansen við málningum og gomlum postalíni, ENJO og Sonja Design. Kafé verður samstundis, har møguleiki verður at keypa køkur og kaffi.

Jóhanna á Tjaldrafløtti og Elisabeth Akursmørk fara at halda fyrilestur um heilsugóðan kost. Sagt verður av hotellinum, at hesin parturin av tiltakinum er ókeypis og fyri øll.

Seinni út á kvøldið, um hálvgum sjey tíðina verður galladøgurði við trimum rættum. Matarskráin er ikki heilt avgjørd enn, men væntandi verður hon aspargessuppa, lambskjøt og heimagjørdur ísur omaná.

Undir borðhaldinum verður felagssangur, sum Noel og Jóhannes skipa fyri. Eisini verður skemt og mótasýning.

Kostnaðurin fyri tiltakið er 300 krónur, og kunnu fólk tekna seg á hotellinum á telefon 451034 ella 217020. Hotellið letur eisini tilboð upp á gisting, har kostnaðurin er 300 krónur fyri hvønn í dupulkamari og 500 krónur á einkultkamari íroknað morgunmat.

### Fara aftur í gongd

Hotel Norð er annars stongt vetrarhálvuna, og verður fyri tað mesta leigað út til ymisk tiltøk. Men tann 1. juni letur hotellið uppaftur fyri summarið, og tað fyrsta tiltakið, sum tá er á skránni, er borðhaldið fríggjakvøldið á norðoyastevnu, har nógv fólk plaga at njóta ein góðan døgurða við undirhaldi og sangi.

– Sum nú er sær summarhálvan bara heilt gott út við ferðafólkum, verður sagt av hotellinum.



*Hotel Norð skipar fyri bindiklubbahugna leygardagin 8. mai*

Made by you

Fríggjadagin 23. kl. 14-18 og leygardagin 24. apríl kl. 10-14 vitjar ein serfrøðingur frá Montana Idé Møblar á Hálsi. Kom og fá góð ráð og vegleiðing um innrætting við Montana.









Montana er ein skipan, ein fræls skipan, sum tú frítt kanst dusa tær innanfyri.
Útgangsstøðið er einfalt, men rúmar óendaligar møguleikar.
Lat hugflogið reika við sniði, litum og virkni.
Dyrka frælsið og tak fólk á bóli við sansaligum skapanarhugi og opnum sinni fyri nýggjum møguleikum.
Og vís hvør tú ert gjøgnum títt rúm.
Tí bara tú merkir, nær tú stendur í tínum rúmi.

IDEmøblar
Uppi á Hálsi
Tel 35 46 80

Montana